Fyrilestur:

# Gandur og gandakellingar

**Best vitjaði fyrilesturin í røðini Setrið á ferð kemur nú til Klaksvíkar. Tað er Eyðun Andreassen, professari, sum heldur fyrilesturin “Gandur og gandakellingar” á bókasavninum í Klaksvík týskvøldið 7. mars kl 20**

SETRIÐ Á FERÐ

Føroyingar hava trúð upp á gand heilt upp til okkara tíð. Onkur ger tað kanska enn. Herviligir gandakønir prestar hava verið í Føroyum, og gandakellingar og gandakallar hava verið fleiri. Eisini í nýggjari tíð eru gandasøgur um menn, konur og onkran einstakan prest. Summi eru kend fyri tað góða, onnur fyri tað illa. Í fyrilestrinum verður spurt, hvat gandur er, og hvat serstakt er við hesum fólkum, ið søgdust at duga gand. Hví hava gandakallar yvirhøvur verið høgt í metum fyri sítt kynstur og gandakellingar í so lítlum meti fyri tað sama. Hvussu kundi gandur sampakka lívsuppfatanina hjá kristnum fólki, ella var hann ikki bara hildin at vera ókristiligur.

Eyðun Andreassen er professari í skaldskapi av manna munni á Føroyamálsdeildini. Hann fekk í 1993 dr.phil heiti fyri bókina Folkelig Offentlighed.

Fyrilesturin er fýra og fjørutiundi í røðini “Setrið á ferð”, sum er fyrilestrarøð við fyrilestrum í Suðuroy, Sandoy, Tórshavn, Vágum, Fuglafirði og Klaksvík. Fróðskaparsetrið og Føroya Fróðskaparfelag skipa fyri røðini saman við kunningarstovunum kring landið og mentunardeildini á býráðnum í Klaksvík.

**ave**



*Nú fáa klaksvíkingar eisini høvi at hoyra Eyðun Andreasen greiða frá um ”Gand og gandakellingar”, ið er higatil best vitjaði fyrilesturin í røðini Setri á ferð*

Miðflokkurin:

# – Stórfamiljubilar skulu hava avgjaldslætta

POLITIKKUR

Sambært miðflokkinum er endamálið við uppskotinum at veita barnafamiljum við fleiri enn trimum børnum ein avgjaldslætta við útvegan av persónbili til fleiri enn 5 persónar. Sum nú er, er avgjaldið á persónbilar tað sama, uttan mun til um bilurin hevur 5 ella fleiri setur. Tá ein bilur hevur 10 setur ella fleiri, kemur hann undir heitið smábussur, og tá fellur avgjaldið burtur. Tá krevst eisini stóra koyrikortið, og er tá talan ikki longur um persónbil til vanlig húski:

– At hava eitt stórt húski er í sjálvum sær kostnaðarkrevjandi. Við støðugum príshækkingum á neyðsynjarvørum – serliga olju – til húsarhald, er tað alsamt vorðið fíggjarliga tyngri hjá størri familjum. Tí eru tað bert tey, sum eru heilt væl fyri, sum hava umstøður at útvega sær ein persónbil til fleiri enn 5 persónar. Hesir bilar kosta í miðal millum 10.000 og 50.000 kr. meira enn vanligir persónbilar. Av teirri orsøk er tað rætt at veita størum familjum stuðul, so hesar hava sama møguleika, sum familjur við minni enn 4 børnum, at útvega sær persónbil eftir tørvi.

Miðflokkurin metir, at við hesum uppskotinum verður tørvurin hjá einstøku familjuni tryggjaður, og at uppskotið eisini er í samsvari við ætlanirnar um høgan føðitíttleika:

– Trygdin er ein avgerandi orsøk til uppskotið. Lóggávan eigur at vera soleiðis skipað, at spurningurin um kostnað ikki skal ganga út yvir trygdina. Familjan við fleiri enn 3 børnum eigur ikki at setast aftur at útvega sær ein størri persónbil, tí hesin kostar meiri enn ein vanligur persónbilur.

**- lh**

## Pensjónistar til Íslands

**Í næstum hava føroyskir pensjónistar møguleika at sleppa til Íslands at taka lut í einum felags átakið fyri pensjónistar úr flestu Norðurlondum**

TÍÐINDASKRIV

Tilboð er komið til allar føroyskar pensjónistar úr Íslandi um at taka lut í einum felags átaki fyri pensjónistar úr Danmark, Norra, Svøríki og Føroyum í døgunum 5. til 12 mai 2006. Fjølbroytt ferðaskrá kann fáast við at venda sær til Sigvald Kristiansen á tlf. 441517/228517. Flogið verður við Atlantsflog og gist verður í tvær nætur á Hotel Cabin í Reykjavík, síðani á Hotel Ørk í Hveragerði saman við hinum norðurlendingunum. Kostnaður fyri flogferð, uppihald og útferðir í Íslandi - alt íroknað – 7.767 kr.





Fá koyrilíkindini í lumman



Nú kanst tú fáa upplýsingar um koyrilíkindi, veðurmátingar, aldumátingar og kunngerðir frá Landsverki beinleiðis á tína fartelefon. Tænastan er sera løtt og skjót at brúka. Sendir tú Landsverki eini sms-boð, fært tú svar beinanvegin. Tú kanst eisini tekna teg til tænastuna koyrilíkindi ella kunngerðir og fáa eini sms-boð, so hvørt okkurt nýtt er. Tænastan er ókeypis at royna fyrsta mánaðin.

Fá meira at vita á heimasíðuni hjá Landsverki.

sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78, Tórshavn

Tel 340 800, Faks 340 801
lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land